Nýggja byggisamtykt

Bygdarráðið í Fuglafirði samtykti á fundi týskvøldið nýggja byggisamtykt fyri Fuglafjørð.

Byggisamyktin verður nú løgd fram í tríggjar vikur, og síðan hava borgarar tríggjar vikur freist at kæra til landsstýrið.

Ongin gartnari

Fuglafjarðar kommuna fær ongan gartnara á hesum sinni. Bygdarráðið feldi á fundi týskvøldið uppskotið, ið mentanarnevndin hevði gjørt tilmæli til.

Upprunaliga uppskotið var at seta eina gartnara beinanvegin at taka sær av kommununuar ongum, men mentanarnevndin mælti til at bíða eitt sindur, at lýsa starvið leyst til heystar og seta gartnaran 1. januar næsta ár. Men málið fall.

Kommunan hevur onki plantað, men eftir at vetrarfriðingin kom í gildi 1. oktober í fjør skuldu fortreytirnar verið til staðar.

Kommunan ætlar eisini at gera eina viðarlund, men striltið hevur gingist við at finna hóskandi stað til viðarlund, tí Jarðarráðið og Skógrøkt Landsins vilja hava viðarlundina aðrastaðni, enn kommunan ætlaði.

Hans Petur farin frá

Felagið S & K hevði aðalfund týskvøldið og fekk tá tveir nýggjar nevndarlimir. Tað eru Steingrím Haraldsen og Ingerð Lamhauge. Tey koma í staðin fyri Hans Petur Joensen, sum hevur verið formaður í 10 ár, og Elly Jensen, nevndarlimur í átta ár.

randi

Tað gamla sum nýtt

Stórar ábøtur verða gjørdar á gamla bygningin á Landssjúkrahúsinum

Tað upprunaliga sjúkrahúsið í Havn verður sum nýtt, tá arbeiðið við at umvæla húsið verður liðugt einaferð ímóti sumri.

Øll vindeyguni skulu skiftast út, húsið verður klætt, nýggjar plátur lagdar og takið og takpapp omaná. Tað mesta á niðaru síðu er gjørt. Eisini verða ávísar ábøtur gjørdar inni á føðideildini, ið er í niðaru hæddini.

Hvat hetta stórarbeiðið fer at kosta, ber ikki til at meta um frammanundan. Jens Christian Dam, timburmeistari í Havn ger arbeiðið fyri rokning.

- Tað bar ikki til at biðja um tilboð, tí so nógvir óvæntaðir trupulleikar kunnu stinga seg upp, tá eitt slíkt hús skal umvælast, sigur Mads Winther á Arkitektavirkinum hjá Árna Winther, sum stendur fyri arbeiðinum. Slíkum trupulleikum møttu handverkararnir eisini, tá tað óvæntað vísti seg at vera neyðugt, at skifta takpláturnar upp. Frammanundan hevði takið likið illa. Mads Winther sigur, at tey eru sera væl nøgd við arbeiðið, handverkararnir hava gjørt nú.

Tað gamla sjúkrahúsið, sum í sínari tíð æt Dronning Alexandrines Hospital, tikið í nýtslu í 1924. H. C. W. Tórgarð teknaði húsið.

randi

Heimahjálpin ger minni reint

Heimahjálpin skal brúka fimm mió. krónur minni enn í fjør, og tí verður minni tíð til hvørt heimið.

Í sreinastu viku hittust tær 13 eftirlitskvinnurnar hjá Heimahjálparaskipanini á fundi í Havn fyri at tosa um, hvussu heimahjálpin kann spara.

Heimahjálparaskipanin fær 49,5 mió. krónur í ár, og tað eru fimm mió. minni, enn stovnurin brúkti í fjør.

- At tænastustøðið broytist er sjálvsagt - tíðin sum heild má niðurskerast. Til dømis verða færri tímar framyvir veittir til reingerð, skulu vit royna at fylgja fíggjarætlanini, siga eftirlitskvinnurnar í tíðindabrævi.

Framyvir er ætlanin at leggja størri dent á samstarvið við familjuna, serliga tá sjúklingurin kemur heim frá sjúkrahúsinum.

- Allar vóna vit, at bólkaheimahjálpin, ið leingi hevur verið í umbúna, kann koma í lag í inniverandi ári, og at vit tá

Framhald á síðu 22

Mugu finna aðra loysn

Vestmanna kommuna fer at biðja um samráðingar við landsstýrið fyri at finna onkran máta at fíggja ferjuleguna



Vestmanna kommuna orkar ikki sjálv at gjalda ferjuleguna. Kommunan heldur tað heldur ikki vera rímligt, tí vestmenningar hava ikki brúk fyri ferjuleguni

Ikki fyrr enn mánadagin fekk Vestmanna kommuna boðini um avgerðina, landsstýrið tók eina viku frammanundan: Vestmanna kommuna sleppur ikki at taka bummpengar frá fólki fyri at ferðast um ferjuleguna í Vestmanna.

- So mugu vit royna okkurt annað, er viðmerkingin hjá Mariu Hansen, bygdarráðsforkvinnu í Vestmanna. Okkurt annað merkir í hesum førinum at taka upp samráðingar við landsstýrið um, at landið onkursvegna antin skal yvirtaka ferjuleguna ella finna aðra loysn, so Vestmanna kommuna ikki heftir fyri byggikostnaðin.

BINDILIÐ

- Tað er sjálvandi í lagi, at ferjulegan er her, men so má hon hvíla í sær sjálvari. Vestmenningar hava ikki brúk fyri ferjuleguni, ið mest fer at verða nýtt av vágafólki og føroyingum øllum, sum skulu av landinum. Ferjulegan er liðið í sambandi Føroya til útheimin.

Vestmanna kommuna er við at koma í neyð av ferjuleguni inni á Fjørð, ið framvegis ikki er heilt liðug. Sam og Ternan nýta hana ikki; okkurt skipið hevur ligið har, tá illveður hevur verið.

NÓGV DÝRARI

Ferjulegan skuldi eitast at kosta 28,5 mió. krónur, og skuldi fíggjast sum aðrar havnir, soleiðis at landið stóð fyri 65 % og kommunan fyri 35 %. Men studningurin frá landinum er goldin yvir fleiri ár, og tí mátti kommunan leggja út. Tað varð gjørt við at taka lán. Renturnar eigur kommunan, sum er byggiharri. Veruligi kostnaðurin fyri ferjuleguna er tí fleiri mió. krónur hægri, og tað ætlar Vestmanna kommuna ikki at gjalda. Bummpengarnar tók kommuna við í fíggjarætlanina, og aðrir útvegir mugu tí finnast.

randi